Tilfeingis- og vinnumálaráðið

Dagfesting:	27. jan. 2026
Mál nr.:	25/29983
Málsviðgjørt:	DP
Ummælistíð:	10.-19. desember 2025
Eftirkannað:	06.01.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tryggingarvirksemi
(Avtaka markið á 300 bruttotons fyri útlendskar P & I-tryggingar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 26. mars 2024, verður í § 1, stk. 9, nr. 3 "til før við einum bruttotonsatali upp á 300 ella meiri" strikað.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Á ólavsøku 2025 varð sjóøkið yvirtikið sum føroyskt sermál. Í tí sambandi vórðu broytingar gjørdar í sjólógini, sum høvdu við sær herd krøv til tryggingar hjá skipum og bátum.

Komið er eftir, at føroysku tryggingarfeløgini og útlendsk tryggingarfeløg, sum lógliga kunnu reka virksemi í Føroyum, ikki bjóða allar tær tryggingar, sum sjólógin krevur. Tilfeingis- og vinnumálaráðið hevur fingið upplýst frá føroysku tryggingarfeløgunum, at ætlanin er ikki at bjóða allar hesar tryggingar. Talan er serliga um nýggju og herdu ábyrgdarreglurnar fyri skjóttgangandi før, styttri enn 15 metrar, sum sigla við ferðafólki, har førleikakrøv eru til føraran, t.d. RIB-bátar, sbr. § 1, nr. 2 og 3 í anordning nr. 1000 frá 30. juni 2025 om ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om ændring af søloven, sum kom í gildi 1. januar 2026.

Sambært tryggingarlógini kunnu tryggingarfeløg úr ES ella EBS-londum frítt tekna ábyrgdartryggingar fyri skip, um bruttotonsatalið er oman fyri 300. Smáir skjóttgangandi bátar, vatnskutarar og RIB-bátar hava eitt bruttotonsatal undir 300 og kunnu sostatt ikki tekna kravdu ábyrgdartryggingarnar hjá útlendskum tryggingarfeløgum.

1.2. Galdandi lóggáva

1. januar 2026 kom § 1, nr. 2, 3, 6, 7 og 56 í anordning nr. 1000 af 30. juni 2025 om ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om ændring af søloven í gildi. Talan er m.a. um krøv í sjólógini um objektiva ábyrgd fyri skaða á persónar og tap av forsyrgjara. Hetta merkir, at tey, ið brúka ella lata onnur brúka ein skjóttgangandi bát við skrokklongd undir 15 metrar, ein vatnskutara ella líknandi far, har útbúgvingarkrav er galdandi fyri føraran ella stýrimannin, skulu tekna eina ábyrgdartrygging, sum rindar fyri skaðar, ið henda í sambandi við siglingina. Ábyrgdartryggingin skal rinda bæði fyri persónsskaðar og fyri skaðar á lutir.

Í Føroyum eru útbúgvingarkrøv einans galdandi fyri sigling við vatnskutarum, luftpútuførum og líknandi, umframt tá ið siglt verður við ferðafólkum við skjóttgangandi RIB-bátum ella skjóttgangandi bátum o.tíl., ið eru undir 15 metrar til longdar, og sum sigla við í mesta lagi 12 ferðafólkum.

§ 1, stk. 9 varð sett í tryggingarlógina við løgtingslóg nr. 43 frá 22. apríl 2021 (Tekning av ávísum sertryggingum í útlendskum tryggingarfeløgum). Við lógarbroytingini varð latið upp fyri, at tryggingarfeløg úr ES ella EBS-londum frítt kundu tekna hesar sertryggingar í Føroyum:

1) Skrokktrygging av flogførum
2) Ábyrgdartrygging av flogførum
3) Ábyrgdartrygging av skipum við einum bruttotonsatali upp á 300 ella meiri – P & I trygging (Protection & Indemnity)
4) Ábyrgdartrygging av flogvøllum (Airport Liability Insurance)

Ásetingin í § 1, stk. 9 í tryggingarlógini er eitt undantak til meginregluna í tryggingarlógini um sínámillum rætt, t.e. kravið um at tey føroysku tryggingarfeløgini skulu hava sama rætt í útlandinum, sum tey útlendsku tryggingarfeløgini fáa í Føroyum, sbrt. § 1, stk. 4 og 5 í tryggingarlógini.

P & I-trygging er eitt slag av ábyrgdartrygging fyri reiðarí og fraktførara, sum fevnir um endurgjaldsábyrgd yvirfyri triðjaparti, sum kann stinga seg upp í sambandi við rakstur av skipi. Tryggingin fevnir vanliga um ábyrgd orsakað av farmaskaða, dálking og persónsskaða.

Sum nevnt bjóða føroysku tryggingarfeløgini ikki allar hesar tryggingar, og vantandi heimildin hjá útlendskum feløgum at tekna P & I-tryggingar fyri før undir 300 BT ger tað ómøguligt hjá føroysku tryggingarfeløgunum lógliga at bjóða slíkar tryggingar umvegis útlendskar samstarvsfelagar.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er fáa til vegar heimild fyri, at tryggingarfeløg í ES- ella EBS-londum, sum í dag ikki lógliga kunnu tekna P & I-tryggingar til før við einum bruttontonsatali undir 300, kunnu tekna hesar tryggingar í Føroyum, so viðskiftafólk í Føroyum kunnu tekna sær lógarásettar tryggingar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við lógaruppskotinum verður heimilað tryggingarfeløgum úr ES- ella EBS-londum at tekna P & I-tryggingar til føroysk skip uttan mun til stødd á skipi.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið hevur verið til hoyringar hjá P/F Betri Trygging, P/F Trygd, Sp/F Howden og Sp/F Íti í tíðarskeiðinum 10.-19. desember 2025. Orsøkin til styttu hoyringarfreistina er, at málið hevur skund, tí lógarkravdu ábyrgdartryggingarnar komu í gildi 1. januar 2026. Harafturat eru tryggingarfeløgini, sum verða ávirkað av lógaruppskotinum, kunnað um ætlanirnar um at avtaka markið upp á 300 bruttotons.

Ongar viðmerkingar vóru til uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur avgerandi týdning fyri eigarar av førum undir 300 BT, sum við broytingini fáa møguleika at tekna lógarásettar tryggingar.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tryggingareftirlitið hevur við heimild í § 1, stk. 5 í tryggingarlógini gjørt avtalu við danska Fíggjareftirlitið um felags tryggingarmarknað við Danmark. Avtalan fevnir um tænastuveitingarvirksemi millum londini bæði á lívs- og skaðatryggingarøkinum og samstarv um eftirlit við hesum virksemi. Føroysk tryggingarfeløg hava sambært avtaluni møguleika at veita tænastuveitingar í Danmark, eins og donsk tryggingarfeløg kunnu veita tænastuveitingar í Føroyum.

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella aðrar avleiðingar orsakað av avtaluni.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Eftir Hoyvíkssáttmálanum kunnu føroysk tryggingarfeløg reka tryggingarvirksemi gjøgnum eina deild í Íslandi ella við tænastuveitingum í Íslandi, eins og íslendsk tryggingarfeløg kunnu reka tryggingarvirksemi gjøgnum eina deild í Føroyum ella við tænastuveitingum í Føroyum. Tað fevnir bæði um lívs- og skaðatryggingarøkið.

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella aðrar avleiðingar orsakað av sáttmálanum.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Lógaruppskotið verður ikki mett at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, eins og lógaruppskotið ikki ger inntriv í rættindini hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld

Lógaruppskotið áleggur ikki skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Ásett verður, at tryggingarfelag, ið er heimahoyrandi í einum ES ella EBS-landi, frítt og uttan nakra fráboðan kann tekna váða undir tryggingarflokki 12, sbrt. fylgiskjali 1, t.e. P & I-trygging (Protection & Indemnity).

Heimildin er ikki avmarkað av bruttotonsatali.

Orsøkin til uppskotið er, at eftir galdandi lóggávu hava m.a. smáir skjóttgangandi bátar, vatnskutarar og RIB-bátar, sum hava eitt bruttotonsatal undir 300, ikki møguleika at tekna ábyrgdartryggingarnar, sum eru kravdar sambært sjólógini. Hetta tí at tryggingarnar verða ikki bjóðaðar av føroysku tryggingarfeløgunum, og vantandi heimild í tryggingarlógini ger tað ómøguligt at tekna hesar tryggingar hjá útlendskum tryggingarfeløgum.

Til § 2
Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tilfeingis- og vinnumálaráðið, tann 27. januar 2026

Eirikur í Jákupsstovu
landsstýrismaður

/ Pól Egholm

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur